Dagfesting: 15. september 2022
Máltal**:** 22/11568-28

# Frágreiðing og tilmæli til landsstýrismannin um at skráseta viðurskifti millum sammóðir og barn í kirkjubókina

**Málsgongd**

Málið byrjar í Uttanríkis- og mentamálaráðnum við einum fyrispurningi frá dómprósti um, hvat og hvussu kann verða ført í kirkjubókina um sambandið millum sammóður og barn, og hvørt barnið hevur rætt til at bera eftirnavn hjá sammóður, á sama hátt sum um talan var um eftirnavn faðirs.

Uttanríkis- og mentamálaráðið svaraði tá (3. mai í 2022), at ráðið er ivaleyst í, at barn ikki eftir galdandi navnalóg frá 2002 hevur rætt at bera eftirnavnið hjá sammóðir. Ráðið gjørdi tó samstundis vart við, at hettar einans var meting ráðsins, og vísti til, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevur evsta tulkingarmyndugleikan. Umhvørvisstovan, ið er stovnurin undir Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, sum umsitur navnamál, vísti í svari sínum til borgaran, dagf. 10. juni 2022, til sera nágreiniligu ásetingina í § 7 í navnalógini, og skrivaði so millum annað soleiðis: "*Navnalógin er ikki broytt isv. broyting av barsilslógina og lóg um børns retsstilling, og Umhvørvisstovan metir tí, at barn ikki sbrt. verandi navnalóggávu kann fáa eftirnavnið hjá eini sammóður."*

Prinsippspurningurin um rættin til eftirnavn hjá sammóðir varð síðani reistur í skrivligum fyrispurningi eftir § 52a í tingskipanini til landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum, 52-002/2022, og her svaraði landsstýrismaðurin millum annað at "...... *hóast § 7 í navnalógini ikki nevnir sammøður, metir Umhvørvis- og vinnumálaráðið, at sammøður sum foreldur sambært familjurættarligu lóggávuni kunnu javnsetast við møður og fedrar í mun til endamálið við § 7, stk. 1, nr. 1, í navnalógini.*". Umhvørvis- og vinnumálaráðið kunnaði biskup beinleiðis um fyrispurningssvarið við skrivi, dagf. hin 23. august 2022. Avrit av skrivinum varð sent Uttanríkis- og mentamálaráðnum til kunningar.

Uttanríkis- og mentamálaráðið vísti í skjali 20 í hesum máli hin 24. august 2022 Umhvørvis- og vinnumálaráðnum á nakrar av grundgevingunum fyri, hví tað metir, at lógartulkingin í svarinum til fyrispurningin ikki kann halda, og bað tí um, at evnið varð viðgjørt millum ráðini á embætisstigi. Umhvørvis- og vinnumálaráðið vendi ikki aftur í sambandi við umbønina um at viðgera evnið saman við Uttanríkis- og mentamálaráðnum, men sendi í staðin hin 6. september 2022 Uttanríkis- og mentamálaráðnum eitt drúgt upprit sum grundgeving fyri avgerð síni (skjal 24 í málinum), og boðaði í sjálvum teldupostinum frá, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið "*....leggur tískil til grund, at lógartulkingin, sum nágreinað í viðfesta uppriti, frameftir verður fylgd.*"

**Meting**

Talan er fyri okkum at síggja um heldur ókenda lógartulking um okkara leiðir, har nýggj rættarstøða í mun til viðurskifti, sum ikki vóru kend, tá lógin varð samtykt, verður skapt við fyrisitingarligari avgerð, heldur enn við lógarbroyting, sum annars er gjørt í aðrari lóggávu um hesi somu viðurskifti, og sum Løgtingið eisini hevur lagt upp til verður gjørt í sambandi við lógina um sammøður.

Løgmansskrivstovan er kunnað um málið og um fatan Uttanríkis- og mentamálaráðsins, men Løgmansskrivstovan ynskir ikki at taka tað upp. Løgmaður hevur tvørturímóti í svari sínum til skrivligan fyrispurning nr. 22/2022 víst á, at landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum "eigur" navnalógina, og harvið eisini tulkingarrættin, og at løgmaður tekur sum givið, at Uttanríkis- og mentamálaráðið fylgir tulking Umhvørvis- og vinnumálaráðsins.

Fyrisitingin er stigveldisskipað (hierarkisk), og málsøkini eru harafturat við *fráboðan løgmans nr. 128 frá 16. september 2019 um býti av málsøkjum landsstýrisins millum landsstýrismenninar, sum seinast broytt við fráboðan nr. 107 frá 5. juli 2022* býtt eintýðugt og út í odd og egg millum landsstýrismenninar og løgmann. Sostatt er altíð eitt, og einans eitt, stjórnarráð, ið er evsti tulkingarmyndugleiki á einum og hvørjum lógarøki.

Løgmaður hevur tó, sambært § 33, stk. 3 í styrisskipanarlógini eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt, og kann sostatt taka mál ella málsviðgerð hjá landsstýrismanni (ella stjórnarráði, ið jú altíð fyrisitir landsstýrismansins vegna) upp, um mett verður, at saklig orsøk er til tess. Av tí at løgmaður ikki ynskir at taka hettar málið upp, og ivi ikki kann verða sáddur um, at navnalógin sambært fráboðanini um býti av

málsøkjum er undir málsræði Umhvørvis- og vinnumálaraðsins, er valla annar møguleiki, enn at avgerð Umhvørvis- og vinnumálaráðsins verður standandi sum innan fyrisitingina endaliga útleggingin av, hvør galdandi rættarstøða er. Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur tí skyldu at umsita samsvarandi hesi, uttan mun til at greiða fakliga fatanin her í ráðnum er, at útlegging Umhvørvis- og vinnumálaraðsins av galdandi rættarstøðu er skeiv og óheimilað.

**Tilmæli**

Vísandi til viðurskiftini, sum lýst eru í uppritinum, verður tí mælt til, at landsstýrismaðurin tekur undir við, at fyrisitingin í Uttanríkis- og mentamálaráðnum vísir biskupi á fyrispurningssvar landsstýrismansins í umhvørvis- og vinnumálum, sum Umhvørvis- og vinnumálaráðið áður hevur víst biskupi á, og heitir á biskup um at skipa soleiðis fyri, at kirkjubókaførandi sóknarprestarnir skráseta samsvarandi tulkingini hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum av navnalóggávuni, tvs. at sammøður kunnu javnsetast við møður og fedrar í mun til endamálið við § 7, stk. 1, nr. 1 í navnalógini, og at sammóður, sum fylgja av tulkingini hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum til fyrispurning 2, kann verða skrásett í faðirs stað sambært lógini um fólkayvirlit.

Torkil V. Rasmussen, deildarstjóri

Bergur Berg, fulltrúi

Katrin Jacobsen, løgfrøðingur